

# Lági oljuprísurin sæst aftur í norska landskassanum

**Jógvan Hugo Gardar**

19.07.2015 - 09:01

Oljan.fo

Norski landskassin fekk fyrra hálvár inn 439 milliardir norskar krónur í skatti, og hetta eru heilar 20 milliardir minni enn somu tíð í fjør.

Sambært norsku hagstovuni, Statistisk Sentralbyrå, er orsøkin til lægru inntøkuna at minni er inngoldið í oljuskatti.

Higartil í ár eru 69 milliardir goldnar í oljuskatti, og tað eru 25 milliardir krónur minni enn somu tíð í 2014.

Inngjaldingarnar frá persónligum skattgjaldarum økti við umleið 12 milliardum.

Umleið 80 prosent av inngjaldingunum í juni komu frá oljuídnaðinum. Níggju milliardir krónur komu frá sjálvum oljuskattinum, og 15 milliardir komu frá einum serligum oljugjaldi sum vinnan hevur fyri at sleppa at framleiva olju. Tað eru ávikavist tríggjar milliardir og fýra milliardir minni enn í juni 2014